TÓRSHAVNAR KOMMUNA

KUNNGERÐ

## Um móttøku av bilvrakum á Kommunalu Brennistøðini

Bilvrak til burturbeiningar skulu latast inn á Jarnplássinum á Hjalla, ið er opið mánadag til fríggjadag kl. 8 - 16. Tikið verður ikki ímóti bilvrakum uttanfyri hesar tíðir. Bilvrak mugu ikki frásetast aðrastaðni á økinum hjá Kommunalu Brennistøðini ella uttanfyri økið.

Fyri at akfarsnummarið á bilvrakinum skal kunna lesast, má bilvrakið ikki kroystast saman undir flutningi.

Saman við bilvrakinum skal vera próvskjal fyri vrakinum (skrásetingarskjal, kvittan fyri innlatin nummarspjøldur ella kvittan frá akfarstryggingini). Bilvrakið verður avvíst, um onki skjal fyriliggur ella samsvar ikki er millum upplýsingarnar á skjalinum og bilvrakinum. Tó ber til at lata bilvrakið inn til burturbeiningar móti einum gjaldi á kr. 500,-.

Innlatingargjald verður rindað ánaranum, tá ið váttan fyri innlatin nummarspjøldur fyriliggur. Um tann, ið skal hava útgoldið innlatingargjald, ikki er hin sami sum skrásetti ánarin sambært próvskjalinum, skal heimildarskjal fyriliggja.

**Kommunala Brennistøðin**
Góðkent bilvraksmóttøkupláss

SNARSKIVAN
www.torshavn.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

## Runavíkar kommuna

Søkir eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi, til at arbeiða á Heiminum fyri minnisveik á Mýrunum í Runavík.

**Krøv til umsøkjarnar:**
- hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur.
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búðfólkunum
- er nýhugsandi og hevur hug og árræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at menna umsorgan og røkt
- góða innleiðslu
- undirvísing
- góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála ímillum Sjúkrarøktarfelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Starvsbrøkurin eitur 0,6, og verður arbeitt í skiftandi vaktum. Starvið verður at seta skjótast møguligt og fram til 15. august 2005

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Unn Justinussen, leiðara á tlf.443065 ella 477080.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

**Runavíkar Kommuna**
Att. Sosiala deild
Heiðavegur 26, Postboks 139
FO-600 Saltangará

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 28. februar 2005 kl.12.00.

## Brunaumsjónarmaður til Tvøroyrar sløkkilið

Søkt verður eftir áhugaðum fólki, manni ella kvinnu, at taka við leiðsluni í Tvøroyrar sløkkiliði.

Starvið er at rokna sum sjálvboðin tænasta, tó við ávísum setanartreytum, og við samsýning eftir nærri avtalu.

Roknað verður við, at møguligur umsøkjari hevur fastan bústað í norðari helvt í Suðuroynni og hevur starv á landi ( er heimafólk).

Øll eru vælkomin at søkja, eisini starvsfólk hjá kommununi og tey sum eru í sløkkiliðnum. Fyrimunur er, at umsøkjarin hevur handaliga útbúgving, men er ikki ein treyt.

Áhuga kunnu eisini brúka hetta høvið, at melda seg til sløkkiliðið, sum vanlig manning.

Tey, ið søkja leiðarastarvið, ella sum vanlig sløkkiliðsfólk og verða sett á liðið, mugu rokna við, at skula taka skeið í sløkkiliðsútbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið, fortreytir o.a. fáast við at venda sær til

kommunuskrivstovuna á Tvøroyri
avgr. : má-fr.dag 10-12 og 14-16 á tlf 371085 ella
Paula Einarson tlf. 210231

Freistin at søkja starvið er 07.03.05. Umsóknin skal sendast:

**Tvøroyrar kommuna**
Brunanevndin
Postrum 80 · 800 Tvøroyri

*Tvøroyrar sløkkilið hevur nýmótans sløkkiútgerð og hevur verið virkið í nógv ár við manning, ið hevur verið til reiðar nátt sum dag, og veitt hjálp, har hon hevur tørvað. 17 mans eru í sløkkiliðnum.*
*Eins og býurin sjálvur, eru uppgávurnar hjá sløkkiliðinum í menning og liggja tí fleiri spennandi uppgávur fyri framman.*
*Sløkkiliðs samstarv er við Hvalbiar kommunu og samstarv er eisini millum øll sløkkiliðini í oynni. Virksemið hjá sløkkiliðnum verður í høvuðsheitum skipað undir brunanevndini. Sløkkiliðið verður fyrisitið av brunaumsjónarmanninum.*

Sosialurin
www.sosialurin.fo